62°N
Hoydalsvegur 17
Tórshavn

+298 34 00 00
booking@62n.fo
62n.fo



# Námsferð til Edinburgh

Námsferðin hjá tykkum til Edinburgh bjóðar uppá nógv annað enn sekkjarpípir og whisky. Tann skotski høvuðstaðurin hevur nemliga eina ríka mentan, stórfingnar bygningar, nógva søgu og einastandandi náttúru.

Prísur fyri hvønn

**Úr 6.900 kr.**

*Tá minimum 20 ferðast saman

## Edinburgh er ein søguríkur býur

Edinburgh er samansett av tveimum býarpartum sum verða atskiltir av Princes Street og vøkru parkini Princes Street Gardens. Old Town sum kemur heilt frá miðøldini, og New Town sum bleiv bygdur í 1700 talinum. Tann gamli og nýggi býarparturin eru sera ólíkir, og tað er serliga hendan einstaka samansetingin av hesum báðum býarpartunum sum hevur sett Edinburgh á heimsarvalistan hjá UNESCO, hetta merkir at mentanin og náttúran hjá Edinburgh er verd at varðveita.

## Ein lættur býur at uppliva

Flogtíðin til Edinburgh er stutt, og býurin er lættur at koma runt í. Tey mest áhugaverdu støðini í Edinburgh liggja mitt í býnum, og tí kunnu tit ganga til mestu upplivingarnar. Um beinini svíkja kunnu tit lætt hoppa í ein býarbuss.

## Tín ferðaráðgevi



**Guðrun Hansdóttir**

**+298 34 00 00**

**gudrun@62n.fo**








62°N
Hoydalsvegur 17
Tórshavn

+298 34 00 00
booking@62n.fo
62n.fo

## Faklig námsferðarætlan í Edinburgh.

Ynskja tit hjálp til at tilrættisleggja tykkara fakligu ætlan í Edinburgh? Vit bjóða nógvar ymiskar vitjanir og upplivingar innan nógv ymisk fak, serliga innan náttúruvísindi, list, mentan og søgu t.d.:

·Our Dynamic Earth hava framsýning um søguna og menningina hjá jørðini frá 15.000 mió. árum síðan til inn í framtíðina.
·Á Surgeons' Hall Savninum kunnu tit læra um menningina í læknavísindi – ein vitjan sum ikki er fyri særtar sálir.
·Vitja Torness kjarnorkuvirkið og uppliv hvussu kjarnorka verður framleidd.
·Vitja søguliga Palace of Holyroodhouse, sum er officielli bústaðurin hjá skotsku drotningini.

## Upplivingar í Edinburgh

Kendasta eyðkenni hjá Edinburgh er Edinburgh Castle. Borgin liggur á 134 metur høga berginum Castle Rock og sæst um allan býin. Borgin er sjálvandi eitt 'must see' á námsferðini í Edinburgh.
Tit kunnu eisini gjarna ganga ein túr í Old Town á tí kendu steingøtuni The Royal Mile, sum tekur tykkum frá Palace of holyroodhouse til Edinburgh Castle.
Á vegnum kunnu tit vitja nøkur av kendu støðunum, sum t.d. Camera Obscura og Writers' Museum. Um tit ynskja meira nútíðar mentan kunnu tit vitja tjóðsavnið The Elephant House – her skrivaði J.K. Rowling Harry Potter bøkurnar.
Í New Town eru góðir shopping møguleikar og fult av georgiskum byggisniði. Og síðst men ikki minst mugu tit eisini uppliva tí flottu skotsku náttúrina, sum tit gera best við einari útferð úr býnum. Farið t.d. ein dagstúr til Loch Lomond – størsta vatnið í Stóra Bretlandi, sum liggur í Trossachs National Park.

# Gisting í Edinburgh

Edinburgh hevur nógvar gistingarmøguleikar mitt í býnum á góðum hostellum og hotellum.




**Góða staðseting**

## St. Christophers Inn

- Góða staðseting í Old Town
- 24-tímars móttøka
- Ókeypis Wi-fi




**Hugnaligt Hotel**

## Claremont Hotel

- Kømur við fleiri sengrum
- Hugnalig lounge
- Ókeypis Wi-fi



**Góða staðseting**

## A&O Hostel

- Liggur nær við Royal Mile
- Høgan standard
- Nógv ítriv

# Íroknað prísinum

- **Ferðaseðlar úr Vágum til Edinburgh**
- **Øll ferðaavgjøld**
- **Gisting í 7 nætur**
- **Morgunmatur**
- **Wi-Fi**
- **24 tímars døgntænasta**